# ítróttur

Nr. 10 • leygardagur • 15. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


VB-Stjørnan 24-23(14-11):

## VB vann á Stjørnuni

**Vágskvinnur vunnu fyrru hálvfinaluna móti Stjørnuni, sum var og vitjaði í Vági hóskvøldið.**


COCA-COLA KAPPINGIN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*


Fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum eydnaðist tað einum av hinum kvinnuliðunum at basa greipuvinnarunum úr Stjørnuni. Men hóast Stjørnan tapti hóskvøldið, so tóktust hvørki venjari ella leikarar hjá klaksvíkingum at verða ónøgdir við úrslitið.

### Framúr málmansspæl

Tað vóru vágskvinnur, sum høvdu leiðsluna størsta partin av dystinum. Eitt skifti vóru tær á odda við fýra málum, men hvørji ferð at VB hótti við at fara frá Stjørnuni, so svaraði oddaliðið aftur.

Úr Vági frætta vit, at talan var um ein serstakliga væl leiktan dyst við nógvari ferð, og har spælararnir stríddust um hvønn einasta bólt. Leikliga dygdin var høg, og nærdystirnir vóru harðir og kontantir, uttan at teir tó gjørdist ófantaligir og ljótir.

Ein av høvuðsorsøkunum, til at VB vann dystin, var tann, at málverjin hjá vágskvinnum, Asta, spældi ein framúr góðan dyst, og ferð aftaná ferð tók hon skotroyndir frá púra leysum Stjørnu-leikarum.



*VB dróg longra stráið, tá ið Stjørnan vitjaði í Vági hóskvøldið í sambandi við fyrru hálvfinaluna í Coca-Cola kappingini*

Liðini bæði hittast aftur í seinnu hálvfinaluni í Klaksvík 26. januar, og við úrslitinum í Vági hóskvøldið er einki avgjørt, um tað verða vágbingar ella klaksvíkingar, sum fara mans-sterkir til Havnar, tá ið steypafinalurnar verða spældar 5. februar.

### VB-Stjørnan 24-23(14-11)

**VB:** Daiva Tomaite 9(4), Rannvá Augustinussen 6, Aukse Vysniaskaite 3, Christina Holm 3, Margreth Augustinussen 1, Arnleyð Hjelm 1, Laila Jespersen 1
**Stjørnan:** Bára Skaale Klakstein 5, Alina Olaru 5, Annika Ljósstein 4(4), Katarina Stjepanov 3, Joan M. Djordjevic 3, Una Olsen 3
**Brotskøst:** VB 4(4), Stjørnan 4(4)
**Útvísingar:** VB 2, Stjørnan 2
**Dómarar:** Brandur Johansen og Heri Petersen

## Trupul uppgáva hjá oddaliðnum

**Í Sunset-kappingini hjá kvinnum verður ein sera spennandi dystur um vikuskiftið, tá ið oddaliðið Stjørnan skal spæla truplan útidyst móti Neistanum á Hálsi sunnudagin**


SUNSET-KAPPINGIN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*


Tríggir dystir eru á skránni í Sunset-kappingini hjá kvinnum um vikuskiftið. Uttan iva mest spennandi dysturin av teimum trimum er tann í Havn sunnudagin, tá ið greipuvinnararnir og oddaliðið Stjørnan kemur at vitja Neistan, sum tykist verða tað liðið, ið er best ført fyri at hótta tey bæði fremstu liðini Stjørnuna og VB.

### Neistin kann yvirraska

Tá ið Neistin var og vitjaði Stjørnuna í Klaksvík fyrr í hesum kappingarárinum, endaði tað við einum 25-22 sigri til klaksvíkskvinnur. Tá var talan um ein javnan og spennandi dyst, har avgerðin ikki fall fyrr enn seint í dystinum.

Tað er heldur ikki óhugsandi, at Neistin kann yvirraska sunnudagin og kanska taka stig frá Stjørnuni. Havnarliðið hevur verið vælkoyrandi seinastu tíðina, og at liðið hevur góðan stríðsvilja, prógvaðu tær væl og virðiliga mikukvøldið í fyrru hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini móti Søljuni á Giljanesi. Tá var Søljan eitt skifti á odda við sjey málum, men Neistin kom sterkt aftur og vann við sjey málum.

Hóskvøldið var Stjørnan og vitjaði VB í Vági í fyrru hálvfinaluni teirra millum, og tá vóru kvinnurnar úr Klaksvík fyri sínum fyrsta ósigri í hesum kappingarárinum, tá ið vágskvinnur vunnu tepturt 24-23.

### Greiðir favorittar

Í hinum báðum dystunum í Sunset-kappingini er talan um dystir, har annað liðið er greiður favorittur.

Í Vestmanna fær VÍF vitjan av VB, og hevði tað verið fyri bert einum ári síðani, so hevði talan óivað verið um ein spennandi og javnan dyst, men VÍF hevur eitt heilt nýtt lið í ár, og enn hevur unga manningin hjá vestmenningum ikki somu styrki sum undanfarna liðið, og tí er VB greiður favorittur til at vinna dystin sunnudagin. Tá ið liðini hittust í Vági, vunnu vágskvinnur stórsigur 31-14, og spurningurin er so, um søgan fer at endurtaka seg sunnudagin.

Seinasti dysturin í Sunset-kappingini hetta vikuskiftið verður á Giljanesi sunnudagin, tá ið heimaliðið Søljan fær vitjan av StÍF. Vágakvinnur hava verið størsta positiva yvirraskilsi í kvinnudeildini hetta kappingarárið, og tær mugu metast sum greiðir favorittar móti kvinnunum av Strondum, sum liggja og stríðast í niðaru hálvu á stigatalvuni.

## Tríggir dystir í høvuðsstaðnum

**Fult umfar er í endaspælinum í Atlantic Airways-kappingini hetta vikuskiftið, og allir tríggir dystirnir verða leiktir í høvuðsstaðnum**


ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN

*Terji Nielsen*

*terji@sosialurin.fo*


Nú farið er undir endaspælið í fremstu mansdeildini í hondbólti, økist spenningurin alsamt, og dystirnir um vikuskiftið kunnu geva eina ábending um, hvørji lið eru at rokna sum møguligir avbjóðarar til tey bæði fremstu liðini VÍF og Kyndil.

### Hvussu sterkir eru kollfirðingar?

Leygardagin eru tveir dystir á skránni. Í høllini á Hálsi fær Kyndil, sum farna vikuskifti misti oddasessin til vestmenningar, vitjan av KÍF, sum nú hevur vunnið seg upp á bronsuplássið beint aftan fyri Kyndil á stigatalvuni. Seinasta sunnudagin vann KÍF ein uppibornan sigur á Neistanum í Hoyvík, meðan Kyndil snávaði á Skála. Mikukvøldið tapti Kyndil enn einaferð, tá ið vestmenningar vunnu við einum máli í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini. Tá sat at kalla alt KÍF-liðið á áskoðaraplássunum, og uttan iva hava teir lært nakað av vestmenningum, sum megnaðu at forða Kyndli í at skora meira enn fimm mál í ein heilan hálvleik.

Hinvegin ætla kyndlamenn sær óivað at prógva, at ósigurin á Skála sunnudagin og á Hálsi mikukvøldið ikki eru nakað tekin um, at teir hava mist stevið. Leygardagin hevur Kyndil Janus Einar Sørensen við aftur, eftir at hann noyddist at verða millum áskoðararnar mikukvøldið, tí at hann fekk reyða kortið á Skála.

### Endurtøka av mikukvøldinum

Í Hoyvík verður eisini ein dystur leygardagin, og tá verður talan um eina endurtøku av fyrru hálvfinaluni mikukvøldið í somu høll. H71 og StÍF bresta tá saman fyri aðru ferð í tríggjar dagar, og ilt er at meta um, hvussu fer at ganga í hesum dysti. Mikukvøldið endaðu strandingar omaná við einum máli, men tað skal sigast, at tá kundi tað eins væl enda við, at tað vóru hoyvíkingar, ið endaðu omaná.

StÍF tykist av álvara verið komið fyri seg eftir eina trilvandi byrjan upp á kappingarárið, og við sigrinum á Kyndli farna sunnudagin fingu teir kanska júst tí neyðugu innspræningina av sjálvsálitið, sum liðið hevur tørv, nú endaspælið er byrjað.

Hoyvíkingar hava hinvegin ikki havt marginalarnar við sær í seinastuni, men í Hoyvík vóna teir óivað, at eydnan fer at verða við teimum móti strandingum leygardagin, so at tað aftur fer at eydnast teimum at fáa nøkur stig til høldar.

### Vestmenningar stórfavorittar

Bert tann eini dysturin í Atlantic Airways-kappingini verður leiktur sunnudagin. Tá skal oddaliðið VÍF aftur ein túr niðan á Háls í Havn, og hesaferð er mótstøðuliðið Neistin. Tað er neyvan ov nógv sagt, at vestmenningar eru stórfavorittar til at vinna henda dyst.

Gamaní noyðist VÍF at verða Áka Olsen fyriuttan, eftir at hann fekk reyða kortið í dystinum móti Kyndli mikukvøldið, men tað eigur ikki at verða nøkur forðing fyri, at VÍF vinnur ein tryggan sigur á Neistanum.

Neistin tapti sum áðurnevnt fyri kollfirðingum sunnudagin, og tann dysturin staðfesti enn einaferð, at spælið hjá havnarliðnum als ikki koyrir í løtuni. Tað tykist sum um, at tað í allarflestu førum er upp til antin Áka Mørk ella Damir Oros at verða teir, sum avslutta eitt álop. Sterki vongurin hjá Neistanum, Blagoje Buha, hevur verið skaddur í drúgva tíð, men farna vikuskiftið var hann eina løtu á vøllinum í dystinum móti kollfirðingum, uttan at hann tó fekk nakað serligt burturúr. Sunnudagin royndist Ólavur Brimnes, sum kanska hevur verið frægasti neistamaðurin í ár, í hvussu so er betur á veinginum enn Buha.